# Nýskapandi rúsdrekkaviðgerð vælkomin

**– Tað er altíð viðkomandi at spyrja, um arbeiðið, sum verður gjørt innan rúsdrekkaviðgerð, er nøktandi. Vísa fólk á tiltøk, sum eru nýskapandi á økinum, viðgera vit málið í álvara og við vælvild, sigur Sámal Petur í Grund, landsstýrismaður við almanna- og heilsumálum**

VIÐGERÐ
*Turið Kjølbro*



*– Fáa vit eitt uppskot um at seta á stovn viðgerð, sum er serliga ætlað kvinnum, kanna vit málið, sigur Sámal Petur í Grund*

Gongdin í Føroyum eins og uttanlands er, at talið á kvinnum, yngri kvinnum og smábarnamammum, sum drekka, er nógv vaksandi. Hetta vísa bæði Finnur Helmsdal, barnaverndarlimur í Havn, og Erna S. Hákonardóttir, alkohol- og familjuráðgevi, á í samrøðum í blaðnum. Men kvinnur eru bæði truplar at fáa í viðgerð og ringar at viðgera. Tær vilja treyðugt inn á teir viðgerðarstovnarnar, vit kenna, tí tær vilja ikki lata seg úr sálarliga saman við eitt nú monnum, sum tær kanska kenna. Seta vit á stovn viðgerð, sum burturav er til kvinnur, fara fleiri kvinnur í viðgerð, er Finnur Helmsdal sannførdur um. Og Erna S. Hákonardóttir er samd. Hon heldur, at tað hevur bráðskund at skipa eitt serligt tilboð fyri kvinnur, eins og gjørt verður aðra staðni. Misnýtslan er so nógv merkt av skomm og fordómum, og tí hava tær tørv á serligari viðgerð. Sjálv lagar hon ráðgevingina til kvinnur øðrvísi til enn til mannligar misnýtarar.

Eingin ætlan er um at seta á stovn viðgerð í Føroyum, sum er serliga ætlað kvinnum. Ei heldur er nøkur ætlan um at endurskoða viðgerðirnar, vit hava í Føroyum, hóast fleiri røddir í seinastuni hava róð upp undir, at tíðin er komin til at gera broytingar. Í londunum rundan um okkum fer stór menning fram innan viðgerðarøkið, og rákið er, at tvørfakligt samstarv er ógvuliga munadygt og at úrslitini av viðgerð eru betri, tá ið viðgerðartilboðini eru sundurgreinað og tilboð eru serliga til eitt nú kvinnur og ungar misnýtarar.

Landsstýrismaðurin við almanna- og heilsumálum hevur ikki viðgjørt í stýrinum ella landsstýrinum, um tíðin er komin til at seta á stovn serliga viðgerð fyri kvinnur.

– Hetta valskeiðið eru reglugerðirnar fyri viðgerðarstovnarnar endurskoðaðar og dagførdar. Einki bendir á, at orsøk er til at broyta viðgerðirnar. Hagtøl og annað vísa, at tørvur er á teimum viðgerðunum. Nógv fólk hava fingið eina rúsfría og innihaldsríka tilveru eftir viðgerð á stovnunum. Um viðgerðirnar eru nóg góðar og nóg nógv fólk verða hjálpt, ber altíð til at kanna. Tað er altíð viðkomandi at spyrja, um arbeiðið, sum verður gjørt, er nøktandi og fylgja við í, hvat hendir innan viðgerðarøkið aðrastaðni. Vit hava ikki viðgjørt, um vit eiga at seta á stovn serliga viðgerð fyri kvinnur.

### Fyri deyvum oyrum

Hava fólk ætlanir um at seta á stovn onnur viðgerðartilboð, er ringt at fáa ljóð fyri hesum hjá almennu myndugleikunum. Tað eru í øllum førum royndirnar hjá Ernu S. Hákonardóttir, sum í seks ár hevur arbeitt sjálvstøðugt sum alkohol- og familjuráðgevi í Havn. Hon sigur í viðtali í blaðnum herfyri, at føroysku myndugleikarnir sova og ikki ynskja at tosa um hesi viðurskiftini.

– Myndugleikarnir halda væl standa til, tá ið vit hava tveir viðgerðarstovnar, men ynskir onkur at seta í gongd arbeiði, sum eru í londunum rundan um okkum og sum góðar royndir eru av, eru ongir møguleikar fyri fígging uttan at veðseta egnar ognir ella fara í bankan at læna pengar. Myndugleikarnir sláa seg til tols við tí sum er, uttan at loyva nýhugsan framat. Hvussu úrslitini eru á verandi stovnum gáa teir ikki um, ei heldur spyrja eftir. Í Føroyum er eingin grunnur, har tú kann søkja pengar til at seta í gongd ymiskt til frama fyri børn og ung úr misnýtarafamiljum. Sjálv havi eg spurt nógva staðni, eisini í Almanna- og heilsumálastýrinum, men haðani havi eg einki svar fingið, heldur ikki frá landsstýrismanninum, sum eg havi sent bræv. Men áðrenn vit kunnu gera broytingar, mugu vit tosa opið um trupulleikarnar sum eru. Teir eru alla aðra staðni, og vit eiga ikki at billa okkum inn, at teir ikki eru her. Spurningurin er bara, hví vit lata eyguni aftur fyri teimum her. Vit hava av tí sama ikki ment okkum innan fyri viðgerð í fleiri ár, sigur Erna S. Hákonardóttir.

Landsstýrismaðurin við almanna- og heilsumálum vísir aftur, at myndugleikarnir avvísa nýskapandi tiltøkum.

– Vísa fólk á tiltøk, sum eru nýskapandi á økinum, viðgera vit málið í álvara og við vælvild. Í hvønn mun nýggj tiltøk fáa stuðul ella hjálp, er ringt at meta um frammanundan. Fáa vit eitt uppskot um at seta á stovn viðgerð, sum er serliga ætlað kvinnum, kanna vit málið, hvat tað kostar og so framvegis. Hinvegin er tað uppgávan hjá Fyribyrgingarráðnum at mæla landsstýrismanninum við almanna- og heilsumálum til at seta nýggj tiltøk í verk og einki tilmæli er komið haðani um, at viðgerðirnar, sum vit hava, skulu endurskoðast, sigur Sámal Petur í Grund.

# Lions Quest: »Nei til narko«

**Lions Club Tórshavn savnar pengar fyri at upplýsa ímóti narkotikanýtslu. Endamálið er at geva næmingunum lívsvirði og sjálvsálit, so at teir m.a. duga at siga nei til rúsevni**

LIONS QUEST
*Tíðindaskriv*



Vikuna fyri páskir skipar Lions Club Tórshavn fyri Tulipantiltakinum undir herrópinum »Nei til narko«.

Tað at berjast móti narkotika hevur framvegis stóran týdning. Havandi í huga tað, sum føroyska politiið arbeiðir við í løtuni, so mugu vit ásanna, at eisini í lítla landi okkara er narkotika av alskyns slag.

Lions klubbarnir í Føroyum hava seinastu árini skipað fyri sokallaðum Lions Quest skeiðum fyri fólkaskúlalærarar og øðrum, ið varða av fólkaskúlanum. Higartil hava á leið 300 fólk verið á skeiði.

Endamálið við Lions Quest er at geva næmingunum lívsvirði og sjálvsálit, so at teir m.a. duga at siga nei til rúsevni.

Í seinastu viku vóru allir lærararnir í Hoyvíkar skúla og Eiðis skúla á Lions Quest skeiði í Hoyvíkar skúla.

Tulipantiltakið verður framt fyri at fíggja nevndu skeið. Í hesum døgum seta lionslimir í Havn seg í samband við fyritøkur, virki og handlar í Suðurstreymoy fyri at fáa tey at keypa bukettir, sum kosta 250 krónur hvør. Ætlanin er so, at henda bukettin saman við skelti við áskriftini »Nei til narko« skal standa frammi á sjónligum staði í vikuni fyri páskir.

Hetta er aðru ferð, at skipað verður fyri tiltaki av hesum slagi. Í fjør vórðu seld góð 500 blómutyssi.



# Hóttur at tiga

*Tað fekk avleiðingar fyri Jógvan Mørkøre, at hann valdi at úttala seg um Menas kanningina, áðrenn hon var almannakunngjørd. Leiðslan á Fróðskaparsetrinum hevur givið honum eina álvarsliga ávaring.*



**Jógvan Mørkøre hevur fingið eina ávaring frá leiðsluni á Fróðskaparsetrinum, tí hann í Sosialinum fyri tveimum vikum síðan úttalaði seg kritiskt um mannagongdina í sambandi við Menas kannngina. Nú fer hann í farloyvi**

*Rúnar Reistrup*

Tað fall ikki í góða jørð, at Jógvan Mørkøre, adjunktur á Fróðskaparsetrinum, í grein í Sosialinum úttalaði seg kritiskt um tann areiðshátt, sum varð nýttur undir sonevndu Menas kanningini.

Eftir at greinin varð prentað, hevur hann fingið so harðar ákoyringar frá rektaranum á Setrinum, at hann nú hevur valt at fara í farloyvi fyri at koma burtur frá øllum rokinum. Í sama viðfangi hevur hann heitt á Magistarafelagið um at lata sakførara hyggja at málinum.

Tá tað kom Jógvan Mørkøre fyri oyra, at Setursleiðslan hevði viðgjørt greinina á einum fundi og avgjørt, at greinin skuldi fáa avleiðingar, valdi hann at søkja um farloyvi.

- Nú er tíðin komin til at eg taki meg burturúr hesum og lati sakførara hjá Magistarafelagnum hyggja eftir málinum, sigur Jógvan Mørkøre, sum ikki kennir seg hava orsøk til at irða seg um nakað av tí, hann hevur sagt við blaðið.

- Ivi var sáddur um óhefta leiklutin hjá Fróðskaparsetrinum í hesum kanningararbeiðinum, og málið er endað sum fyrispurningur í tinginum, tí at Fróðskaparsetrið valdi at stinga høvdið í sandin í staðin fyri at bera so í bandi, at øll kort vórðu løgd á borðið, sigur Jógvan Mørkøre. Gitingar og leysasøgur fingu frítt spæl, har navngivnir persónar fingu hongt bæði líkt og ólíkt um hálsin. Tað kann eingin liva við í longdini. Fyrr ella seinni noyðist tú at taka blaðið frá munninum, sigur Jógvan Mørkøre.

Deildarráðsleiðari á Setrinum:

# Tað er frítt at siga hvat man vil

**Á einum universiteti eiga fólk at kunna siga hvat tey vilja undir egnari ábyrgd, og Jógvan Mørkøre hevði tí fullan rætt at úttala seg um Menas-kanningina. Tað sigur deildarráðsformaðurin á Søgu- og Samfelagsdeildini, nú rok stendst av at Jógvan Mørkøre í Sosialinum førdi fram kritik av kanningini.**

TALUFRÆLSI
*Rúnar Reistrup*

Jógvan Mørkøre, adjunktur á Fróðskaparsetri Føroya, er so hart átalaður av ovastu leiðsluni á Setrinum, at hann nú hevur søkt um at sleppa í farloyvi.

Eftir at tað í longri tíð hava verið samskiftistrupulleikar á Fróðskaparsetrinum orsakað av arbeiðinum við sonevndu Menas-kanningini, fleyt bikarið eftir øllum at døma yvir, tá Jógvan Mørkøre, í samrøðu við Sosialin, millum annað alment managongdina í arbeiðinum at gera Menas kanningina, sum tá ikki enn var almannakunngjørd.

Mánakvøldið kundi Útvarpið so bera tey tíðindi, at Jógvan Mørkøre hevði biðið um at sleppa í farloyvi í tríggjar mánaðir.

### Talufrælsi

Deildarráðsformaðurin á Søgu- og Samfelagsdeildini, Jóan Pauli Joensen, upplýsir, at Jógvan Mørkøre, ið er knýttur at deildini sum adjunktur, hevur søkt um farloyvi orsakað av ávísum trupulleikum, men leggur dent á, at talan er ikki um trupulleikar á Søgu- og Samfelagsdeildini.

Tað bar ikki til at fáa orðið á Maluna Marnersdóttir, rektara á Fróðskaparsetrinum, áðrenn blaðið fór til prentingar, men við Útvarp Føroya mánakvøldið, segði rektarin í stuttari viðmerking, at tað er rektarin, sum myndar Fróðskaparsetrið úteftir.

Spurdur um tað er nakað forgjørt í at ein adjunktur úttalar seg alment um mál, ið viðkoma Fróðskaparsetrinum, svarar Jóan Pauli Joensen, deildarráðsformaður, at tað á einum universiteti prinsipielt er hvørmans rættur at siga tað, hann vil.

- Um ein adjunktur til dømis ikki er samdur við tí, sum Fróðskaparsetrið alment førir fram, so er tað hansara fulli rættur at gera sínar egnu viðmerkingar. Tá hann úttalar seg er tað fyri egna ábyrgd og tí hevur Jógvan Mørkøre prinsipielt sæð fullan rætt til at siga hvat hann vil. Tað er umráðandi við talufrælsi, kanska serliga á einum universiteti, sigur Jóan Pauli Joensen og leggur afturat, at eftir hansara tykki var einki í vegin við mátanum, sum Jógvan Mørkøre úttalaði seg til Sosialin.

### Óneyðuga hørð orð

Sambært deildarráðsleiðaranum á Søgu- og Samfelagsdeildini, botna trupulleikarnir í sambandi við Menas kanningina í, at misskiljingar hava havt við sær, at tað eru follin nøkur óneyðuga hørð orð, sum hava verið til óneyðugan ampa.

- Talan er eftir mínum tykki um eitt mál, sum er farið fullkomuliga út av proportiónum. Tað hava verið samskiftistrupulleikar í sambandi við arbeiðið at gera Menas-kanningina, men nú er úrslitið av henni almannakunngjørt, og so eiga vit at leggja tað afturum, sigur Jóan Pauli Joensen.

Hann hevur valt at viðmæla umsóknini hjá Jógvani Mørkøre um tríggjar mánaðar langt farloyvi.

- Eg vóni at Jógvan Mørkøre vendir aftur, tá teir tríggir mánaðirnir eru gingnir, og at vit tá hava lagt trupulleikarnar við Menas-kanningini afturum, sigur Jóan Pauli Joensen, deildarráðsleiðari á Søgu- og Samfelagsdeildini á Fróðskaparsetri Føroya.